

www.oljan.fo

**Jan Müller** 28 - 02 - 2012

# Mærsk væntar minni oljuframleiðslu í ár

Roknskapurin fyri 2011, sum A.P. Møller-Mærsk almannakunngjørdi í morgun, vísir enn einaferð, at tað er oljudeildin Maersk Oil, sum gevur serliga nógvar pengar í felagskassan. Avlopið hjá Maersk Oil í fjør var góðar 11 milliardir krónur samanborið við 9,3 milliardir árið fyri. Men nú kemur vend í. -Maersk Oil væntar, at úrslitið í ár verður munandi verri enn í 2011, tí vit rokna við, at oljuframleiðslan fer at minka eini 20 prosent, so hon verður um 265.000 tunnur um dagin, og vit vænta okkum 105 dollarar fyri hvørja tunnu, skrivar leiðslan hjá AP. Møller-Mærsk í frágreiðingini til roknskapin. Sagt verður, at framleiðsla felagsins í Qatar fer at minka í ár, samstundis sum minni verður at fáa burtur úr leiðunum í Norðsjónum. Eitt vónbrot Jacob Pedersen, sum er greinari hjá Sydbank, sigur, at tølini um oljuframleiðsluna hjá Maersk oil eru eitt vónbrot. Hann vísir á, at felagið framleiddi 377.000 tunnur um dagin í 2010 og bara 333.000 í fjør. Og tað ger ikki vónbrotið minni, at felagið væntar at framleiða bara 265.000 tunnur um dagin í ár, sigur hann. -Tað er hugvekjandi, at oljuframleiðslan minkar 20 prosent. Tað er nógv meiri, enn eg hevði roknað við, og so vítt eg veit, hevur marknaðurin mett framleiðsluna til 315.000 tunnur í ár, sigur Jacob Pedersen við Berlingaran. Maersk Oil roknar við at brúka meiri enn eina milliard dollarar til oljuleiting í ár, og felagið sigur, at tað hevur ikki slept málinum, sum er, at tað skal framleiða 400.000 tunnur um dagin. Tað er hálva aðru ferð meiri, enn felagið væntar at framleiða í ár.